# Ein grein full av bløðum



**Vit eru von við at lesa bløð, sum eru full av greinum. Men á myndini síggja vit eisini eina grein, sum er full av bløðum. Ein lesari var inni á gólvinum og spurdi, um hann ikki kundi fáa hesa greinina í blaðið. Jú, tað var gamaní. Og soleiðis hendi tað, at eitt blað fult av greinum eisini innihelt eina grein fulla av bløðum...**

# Súkklan yvirhálaði



**Spanski Moto-koyrarin Dani Pedrosa var yvirhálaður, tá ið hann varð við í Japan Motorcycle Grand Prix sunnudagin. Hesaferð var tað ikki ein av kappingarneytunum, sum yvirhálaði hann, men hansara egna motorsúkkla.** Mynd: Polfoto

# King in the castle



**Sam Hui er rættiliga á toppinum í Hong Kong, har hann er poppstjørna. Nú um dagarnar hitti Sam Hui pressuna fyri at skapa umtalu av einari stórar konsert í desember. Við leopard troyggju, keppi og sjálvandi armbandið legði Sam Hui alla pressuna fyri sínar føtur. Jú, hann er sanniliga nakað fyri seg.** Mynd: Polfoto

# Radioaktivitetur

Frá fyrst í oktober verður nógvur radioaktivitetur í Miðlahúsinum í Vágsbotni, í sambandi við at nýggja radiostøðin verður tikin í nýtslu. Fyri at staðfesta at talan er um ein veruligan loftmiðil, kemur støðin at senda frá loftinum í Miðlahúsinum.

# Í rangastrúpan

*Er okkurt komið í rangastrúpan, er hetta komið heilt skeivt í hálsin. Og soleiðis er eisini við teimum útsagnunum, sum vit hava prentað niðanfyri. Eisini hóast hesar útsagnir eru á prenti. Samstundis sum vit prenta hesar, vilja vit við hesum senda eina áheitan til lesarar okkara um at siga frá, um líknandi skeivleikar ella bara løgnar útsagnir eru at síggja í prentaðu miðlunum. Fráboðanir um hetta kunnu sendast okkum við bæði bræv- og telduposti.*

**Tóm postboks**
Føroya Banki einki bræv fingið
Dimmalætting

**Tann øvugta verð**
Munkarnir hótta hernaðarstýrið
Sosialurin

**Tað spøkir**
Meira lív í bøkurnar á Sunda bókasavni
Dimmalætting

**Fortíðin broytist ikki**
Ingi Olsen segði seg fyrst og fremst vera spentan til uppgávurnar, sum liggja fyri framman.
Sosialurin

**Elementary, my dear Watson**
Ov nógvir pengar brúktir og ov fáar inntøkur gevur eitt undirskot
Dimmalætting

**Føroyskt ella danskt?**
Fíggjarmálaráðið kannar banker
Sosialurin

# Leyst og fast um stórt og smátt

**Leyst og fast um stórt og smátt**

**Nú skal man til Skælings fyri at finna ein, sum er oftari í karantenu enn Mikkjal Thomassen!**

**Summir lærarar eru DANSANDI óðir um sanguppskotið hjá mentamálaráðharranum!**

**Fólkaskúlin skal hava fleiri STREINGIR at spæla uppá!**

**Formaðurin í Lærarafelagnum er í LUFTINI, men hann er jú eisini formaður í FLOGbóltsambandinum!**

**KÍ-kvinnurnar fara at venja bonkpress í allan vetur, bara fyri at fáa mótstøðu!**

**Hini kvinnuliðini burdu kanska stovnað eina "Mótstøðurørslu"!**

**Mennirnir hjá KÍ høvdu "66-liðið". KÍ-kvinnurnar fara nú at verða nevndar "AFTER EIGHT"**

**Dimma sigur, at Annita á Fríðriksmørk hevur mest talutíð í Løgtinginum, og at Sverre Midjord møtir ringast upp í tinginum. Hvat við, at Annita keypti TALUTÍÐ frá Sverra??**